LM-053/2025

Dátueftirlitið

Løgmálaráðið

Saltangará, tann 6. november 2025
J.nr: 25/27221-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: TH

Hoyringssvar viðv. "Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli"

Løgmálaráðið hevur sent eitt lógaruppskot um at broyta vakmyndatólslógina í hoyring. Endamálið við broytingini er, at kommununar framyvir skulu hava heimild til, at seta upp vakmyndatól til tess at økja um trygdina á serliga útsettum støðum í kommununi.

Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Yvirskipað
Ætlaða lógarbroytingin heimilar kommunum at seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki, har tørvur er á at fremja átøk fyri at økja um tryggleikan. Talan er um eina heimild, ið Dátueftirlitið metir at kommununar *ikki* hava sambært galdandi rættarstøðu.

Verður uppskotið samtykt hevur tað við sær, at kommunur fáa heimild at seta upp vakmyndatól í áðurnevndu økjum, og at viðgera persónupplýsingar við tí endamáli, at økja um tryggleikan í viðkomandi økið.

Kravið um viðgerðarheimild, ella viðgerðargrundarlag er harvið uppfylt. Men, eins og viðmerkingarnar eisini vísa á, so er løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (t.e. dátuverndarlógin) eisini galdandi.

Dátueftirlitið hevur havt fund við Løgmálaráðið í sambandi við arbeiðið at fyrireika lóggaruppskotið. Í heila tikið hevur Løgmálaráðið tikið sjónarmiðini hjá Dátueftirlitinum til eftirtektar, og viðmerkingarnar í lógaruppskotinum greiða væl frá hvat tað merkir, at yvirvøkan skal halda ásetingarnar í dátuverndarlógini. Dátueftirlitið metir tað tí ikki vera neyðugt at endurtaka krøvini í hoyringsvarinum, men bert staðfesta, at samstundis sum yvirvøkan skal halda ásetingarnar í vakmyndatólslógini, so skal hon eisini halda ásetingarnar í dátuverndarlógini.

Dátueftirlitið hevur tók hesar ítøkiligu viðmerkingarnar:

Dátuábyrgdin
Í sjálvum lógartekstinum verður ásett, at kommunustýrið kann, eftir tilmæli frá politinum, seta upp vakmyndatól til tess at økja um trygdina í einum ávísum øki.
Hóast tað ikki verður ásett beinleiðis í lógartekstinum, so verður í viðmerkingunum greitt frá, at tað er kommunan, ið er dátuábyrgdari fyri viðgerðina av persónupplýsingum, ið fer fram í sambandi við yvirvøkuna.

Dátueftirlitið

Í § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini er ásett, at ein dátuábyrgdari er

> *"Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast."*.

Tað vil siga, at tað er dátuábyrgdarin ið ger av, hvat endamálið við viðgerðini er. Tá ein kommuna setur upp vakmyndatól sbrt. nýggju § 6 a í vakmyndatólslógini kann tað hugsast, at tað eins væl kann vera politiið, ið tekur stig til at biðja kommununa seta vakmyndatól upp sum at tað er kommunan, ið tekur stig til yvirvøkuna og biður politiið um eitt tilmæli.

Ivi kann tí taka seg upp um tað er kommunan ella politiið ið er dátuábyrgdari sbrt. § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini í hvørjum einstøkum føri. Fyri at koma slíkum ivamálum til lívs verður mælt til, at tað framgongur beinleiðis av ásetingini, at tað er kommunan ið er dátuábyrgdari.

Líknandi ásetingar eru í m.a. Løgtingslóg nr. 33 frá 10. mai 2024 um Kervi+ og Løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2023 um almennu talgildu postskipanina Mínboks.

Endamálsavmarking
Í nýggju § 6 a, stk. 3 verður ásett, at upptøkurnar bert kunnu latast víðari til politiið til tess, at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot og, at tað einans er politiið, sum kann viðgera persónupplýsingar í sambandi við upptøkur fevndar av ásetingini. Harvið er viðgerðin av persónupplýsingum avmarkað til bert at umfatað tørvin hjá politiinum. Kommunan kann *ikki* viðgera upplýsingarnar til nakað annað endamál. Í viðmerkingunum verður nomið við hetta í serligu viðmerkingunum á bls. 14, har greitt verður frá um endamálsavmarking.

Dátueftirlitið er samt við viðmerkingunum hjá Løgmálaráðnum, og leggur áherðslu á, at um lógaruppskotið verður samtykt og kommunur velja at brúka heimildina í § 6 a, so kunnu persónupplýsingarnar *bert* viðgerast við tí fyri eyga, at økja um tryggleikan. Um kommunan ynskir at seta upp vakmyndatól fyri at fyribyrgja innbroti, herverki og líknandi, so hevur man heimild til tað sum er. Tann yvirvøkan skal tó vera nógv meira avmarkað, og bert fevna um tær ítøkiligu inngongdir, ognir o.l., ið roynt verður at verja.

Rímiligheit
Í § 7, stk. 1 nr. 1 í dátuverndarlógini er ásett ein meginregla um lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni. "Rímiligheit" merkir, at viðgerðin ikki má gera størri inntriv í rættindini hjá tí einstaka enn neyðugt er fyri at røkka endamálinum. Tað merkir m.a., at vakmyndatól ikki skal taka upp meira enn neyðugt og ikki í longri tíðarskeið enn neyðugt.

Yvirvaking sbrt. nýggju § 6 a eigur tí at verða avmarkað bæði í tíð og vavi til tað ið er neyðugt fyri at røkka endamálinum. Ein ítøkilig meting skal gerast í hvørjum einstøkum føri.

Dátueftirlitið skal í hesum smbandi vísa á, at metingin um rímiligheit ikki bert skal gerast áðrenn yvirvakingin verður sett í verk, men eisini leypandi – eitt nú tá ein ávís tíð er fráliðin. Tað er, sum nevnt omanfyri, eitt krav at viðgerðin er neyðug í mun til endamálið. Um tað seinni vísur seg, at yvirvakingin onga praktiska nyttu hevur havt (eitt nú at tað ongantíð hevur verið tørvur á upptøkunum) kann tað verða ein ábending um, at tørvurin á yvirvakingini ikki er til staðar og at tað tískil ikki er rímiligt at yvirvakingin heldur fram. Dátueftirlitið kann í slíkum førum koma til ta

niðurstøðu, at viðgerðin ikki longur er rímilig og tí í stríð við dátuverndarlógina. Í so fall skal viðgerðin steðga *hóast* kommunan hevur heimild at seta vakmyndatól upp sbrt. nýggju § 6 a. Harumframt er í § 49 í dátuverndarlógini ásett, at í ávísum førum skal ein dátuábyrgdari gera eina avleiðingargreining um dátuvernd (Data protection impact assessment) áðrenn viðgerðin byrjar. Hetta er sbrt. § 49, stk. 2 nr. 3 galdandi tá talan er um umfatandi og skipaða yvirvøku av alment atkomuligum øki.

Tað vil siga, at áðrenn yvirvaking sbrt. nýggju § 6 a kann setast í verk skal kommunan gera eina avleiðingargreining sbrt. § 49 í dátuverndarlógini.

Revsiábyrgd
Á bls. 17 í lógaruppskotinum verður víst til § 10 í vakmyndatólslógini, í ásetur at brot á løgtingslógina kunnu revsast við sekt.

Í viðmerkingunum verður eisini sagt at

> *"Hetta hevur við sær, at tað verður revsivert at seta upp vakmyndatól uttan at hetta er gjørt í samráð við politiið og at tað verður revsivert at víðarigeva upptøkur til onnur enn politiið. Eisini verður tað revsivert at goyma upptøkur í meir enn 30 dagar."*

Dátueftirlitið skal viðmerkja, at sbrt. § 10, stk. 5 í vakmyndatólslógini koma feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar undir revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

Í § 27, stk. 2 í revsilógini er ásett at

> *"Landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar og kommunur kunnu bert revsast fyri brot, sum verða gjørd í sambandi við virksemi, sum svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum."*

Dátueftirlitið hevur ta fatan, at virksemið ið ein kommuna fer undir sbrt. nýggju § 6 a *ikki* svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum, og at ein kommuna tí *ikki* kann revsast fyri at seta upp vakmyndatól uttan at hetta er gjørt í samráð við poliitið, at víðarigeva upptøkur til onnur enn politiið ella at goyma upptøkur í meir enn 30 dagar.

Dátueftirlitið byggir hesa fatan á, at neyvt sama orðing um revsing verður nýtt í dátuverndarlógini, og tann vanliga fatanin er at kommunur og almennir myndugleikar *ikki* kunnu sektast fyri brot á dátuverndarlógina.

Hinvegin, so tekur Dátueftirlitið undir við, at kommunur kunnu revsast fyri omanfyri nevndu brot, og mælir til, at ein ásetting um hetta verður sett inn í vakmyndatólslógina.

Vegna Dátueftirlitið

Tóri Højgaard
stjóri